VIÐMERKINGAR

# Havnin skal skína



JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri

Umhvørvisvikan í Tórshavnar kommunu er eitt átak, sum býráðssamgongan hevur sett í verk sum liður í sínum trivnaðar- og umhvørvispolitikki.

Ruddingardagarnir í Tórshavnar kommunu vóru dotnir niðurfyri, tí býráðið hevði ov lítlan áhuga. Tað settu vit okkum fyri at fáa aftur á beint.

Hartil varð gjørt av at víðka átakið til eitt umhvørvisátak úr ymsum sjónarhornum – alt við tí endamáli at birta upp undir hugin til at halda bygd sum óbygd øki rein.

Røkt av umhvørvinum er ein týðandi partur í trivnaðarpolitikkinum, sum fyri ein part má gjaldast við stórum pengum og fyri ein part kann gerast fyri næstan onki.

Umhvørvisdagarnar hoyra til hendan seinna flokkin, har fólk, feløg og stovnar kunnu gera sítt til, at Havnin og øll kommunan skínur.

Í heila tikið fylla mál av hesum slag nógv hjá býráðssamgonguni.

Eitt er tað, sum ruddast kann oman á jørðini. Annað er at halda reint í undirstøðukervinum undir býi og bygdum.

Kloakkirnar eru ikki tað, vit síggja mest til – og tær hava ikki verið hildnar at geva flestu atkvøðurnar – men tá tær eru ófullfíggjaðar og illa røktar er okkara umhvørvi hareftir. Skitið, ótespiligt og rýkur illa til ampa fyri trivnaðin.

Her hava vit júst stungið út í kortið at taka eitt rættiligt tak.

Vit halda fram at endurnýggja kloakkirnar í býnum, vit halda fram at beina kloakkirnar gjøgnum reinsibrunnar burtur frá vágunum út á streymasjógv og vit fara eisini víðari at taka somu stig í t. d. Hoyvík og øðrum býlingum og bygdum.

Hetta eru viðurskifti, sum ikki hava verið nóg høgt raðfest. Tí krevst eitt munandi tak komandi fimm árini fyri at náa málunum um alla kommununa – og lúka krøvini frá heilsufrøðimyndugleikunum.

Fyri ca. 15 mió kr um árið til 2010 skuldi setningurin verið rokkin. Tá skuldu allar kloakkir í miðstaðarøkinum verið tryggar og ongi ótespilig útlát verið í náttúru, áir og sjóvarmála.

Burturbeining av avfallinum oman á jørð hevur eisini fingið eina dygga dagføring. Brennistøðin á Hjalla var illa slitin, og fekk hon ikki eina munandi dagføring, so beyð henni ikki bøtur.

Sjálvur ovnurin hevur fingið eina sonevnda albøting, so brennistøðin lýkur øll krøv næstu 10 árini, og haraftrat verður eitt nýtt roykfiltur sett á støðina, so skaðiliga útlátið í umhvørvið verður sum minst.

Økið uttan um brennistøðina verður skipað av einslistum til skiljing og viðgerð av ruskinum – lívrunnum sum vandamiklum.

Og tann dagurin er kanska ikki so fjarur, tá kommunan fer at medvirka til, at slíkt, sum onkur koyrir burtur, kann koma til aðra nýtslu og setast til sølu í eini endurnýtslubúð – heldur enn at verða koyrt í ovnin.

Umhvørvisvikan snýr seg, tá alt kemur til alt, um at menna tann hugburð millum manna, at vit altíð taka upp eftir okkum.

Tá verður so nógv lættari hava alt reint og frískligt rundan um okkum.

# Rættleiðing til Mentamálaráðharran



HJALMAR N. POULSEN
Vestmanna
hin 10.5-2006

Í týsdags-dimmuni og - sosialinum pástendur hann, at maskinmeistaraútbúgvingin ikki er í vanda, hóast hann sjálvur er nógv betri vitandi.

Jú sætt er.- Maskinmeistaraútbúgvingin er sanniliga í vanda.

Fyri at undirstrika hetta postulat, verður víst til skrivliga fyrispurningin, sum háttvirdi tinglimur Annita á Fríðriksmørk hevði til mentamálaráðharran í tinginum fríggjadagin 3. mars í ár. Svarið vit fingu frá mentamálaráðharranum 20. apríl, var villeiðandi uttanumtos, fyri ikki at siga direkta ósætt og bar brá av fingravaski í skundi. Átakið eydnaðist honum stak væl og almenningurin, sum so, fekk ein varhuga av, at alt var í fínasta lagi.

Hann svarar m.a.: At fyri at ongin misskiljing skuldi verða, var neyðug kunning um bygnaðarbroytingar givin avvarandi pørtum í góðari tíð. Hví nevndi hann ikki í hesum sambandi leidslubygnaðin, sum samanlagdi skúlin í framtíðini kom at virka undir? Hví segði hann ikki sum var, at lógloysi valdaði á økinum og "lógarkravda útbúgvingarráðið" samb. løgtingslóg frá 24. apr. 2001. enn ikki var mannað, soleiðis at diktatorisku mannagongdirnar, av hesi orsøk, ótarnaðar og út frá einum leiðslusjónarmidið kundu setast í verk?

Er tað tilvita forsømilsi ella embatismannafusk? "Lógarkravda útbúgvingarráðið" er enn tann dag í dag ikki sett, hóst felagið upp í saman fleiri ferðir í langa tíð hevur eftirlýst hesum. - So kom tað eisini uppá pláss!

Áðrenn nøkur skúlaleiðsla var sett, var upplýst, at hon skuldi verða samansett soleiðis, at hon á ongan hátt skuldi kunna "favorisera" útbúbvingargreinirnar á nakran hátt. Av hesi orsøk fingu ávísir áhugaðir umsøkjarar at vita, at fagligt tilknýti kundi vera ein meinbogi, og at inhabilir umsøkjarar í so máta ikki blivu góðtiknir. Allíkavæl bleiv stjóri við navigatørútbúgving settur fyri samanlagda skúlan. .- Frávik í lógini ella hvat?

At Mentamálaráðið undrast á arbeiðsháttin hjá maskinmeistarafelagnum er kanska ikki so løgi, tí tað skuldi ikki verið neyðugt at tala at í so máta. Men lat tað vera sagt, at limir felagsins síggja tað sum sína skildu, at verja eftirkomarir okkara á hesum øki, soleiðis at teir í framtíðini, ikki slongjast sum bukka millum sengur orsaka av kleyvarskapi í umsitingini. Skulu lógarkravdu dygdarkrøvini framvegis uppfyllast, má annað skinn takast um bak. Fyrst og fremst í Mentamálaráðnum,- soleiðis at skil aftur fast á vinnu- og miðnámsskúlum landsins, sum í stóran mun liggja í andaleypi orsaka av umsitingarligum fuski.

Havi granska á hesum øki,- tó alt gott um "gransking",- men lítil fuglur sang um at ávísar neglir, høvdu sett seg á "reiðrið" uppi við Krákugjógv.

.

# Spurningur til Petur Rasmussen, leiðara hjá FaroeJet



GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Eg læs greinina hjá tær í Sosialinum tann 8/5, sjálvsagt við áhuga, tí hetta er væl maður við stórari vitan. Men eftir at hava lisið greinina lidna, fánaði eg burtur. Tí hvat sigur hesin maður, sum altíð skuldi sett trygdina í hásæti?

Pætur mælir til tveir flogvallir í Føroyum, men báðir nýtast ikki at verða fult operativir!

Hesin maður hevur stórar royndir, 32 ár á baki í bransjuni.

Tað sum eg vil nerta við, er at vit nú eru farin at tosað um at útbyggja flogvøllin í Vágunum, og er tað neyðugt her og nú.

Men so verður eisini tosað um at leggja ein annan flogvøll aðarstaðni í Føroyum. Í byrjanini var tosað um Skorðhædd, Glyvursnes og Seltuvík.

Her eru kanningar gjørdar, og fleiri verða gjørdar. Tann fyrsta kanningin soldar Skorðhædd frá, somuleiðis er hon sera yvingarsom fyri Glyvursnesi, men vísa Seltuvík størsta áhuga.

Eg eri hvørki førur fyri, ella ætli mær at siga hvar er best at flogvøllurin er. Vit hava akkurát fingið at vita, at helst tekur tað 5 ár at gerða kanningar.

Hví kemur so Pætur Rasmussen og setur striku yvir allar kanningar, og sigur Glyvursnes? Sig mær, setur tú ikki trygdina í hásætið, ella hví bíðar tú ikki sum onnur til endans útfall?

Eg síggi úr køksvindeyganum yvir á Kirkjubønes, har sær tú einki summarhálvina fyri mjørka! So út frá tí, er Glyvursnes neyðvan besta loysnin.

Helst um eini 10 ár, hava vit tveir flogvallir í Føroyum, í Vágunum og helst í Seltuvík sambært fyrstu útsøgnini.

So Pætur Rasmussen, latið okkum ikki standa eftir við tí fatan, at trygd fyri tær, er sum ein býur í Kina, sum tikið verður til.

# Jóannes dupult so góðar sømdir sum Edmund



HEIDI PETERSEN,
løgtingskvinna

Ein viðmerking til greinina í Sosialinum 15. mai undir yvirskriftini »Jóannes Eidesgaard skal hava somu sømdir sum Edmund Joensen«. Áki Bertholsen hevur skrivað. Sum ikki einaferð fær Jóannes Eidesgaard høvi at vaska hendur í Sosialinum við at siga, at »tað var jú undanfarna samgonga«, sum samtykti eftirlønir til tingfólk, og nú gera vit tað sama fyri landsstýrisfólk og koyra eftirlønina upp á 60% frá teimum 45%.

Men sum ikki einaferð er hetta akkurát helvtin av sannleikanum í tí, sum er farið fram, tað sum er samtykt gevur landsstýrismonnum akkurát dupult so nógva eftirløn pr. ár sum løgtingsfólkunum, tí løgtingsfólk skulu vera vald inn á Føroya Løgting í 16 ár fyri at fáa fulla eftirløn, og landsstýrisfólk skulu vera sett sum landsstýrisfólk í 8 ár fyri at fáa fulla eftirløn.

So løgtingsfólk upptjena 1/16 av fullari eftirløn pr. ár og landsstýrisfólk 2/16 av fullari eftirløn pr. ár. So yvirskriftin átti kanska at heldur at verið »Jóannes dupult so góðar sømdir sum Edmund«.

heidi.petersen@skulin.fo

# Vága Floghavn verður útbygd og nútímansgjørd



ALFRED OLSEN
Løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin

Eg havi við stórum áhuga fylgt við viðgerðini av flogvallarspurninginum í bløðunum, útvarpi og sjónvarpi, hesa seinastu tíðina.

Nógv áhugavert og skilagott er sagt og skrivað um eina komandi floghavn í Føroyum, og eg fegnist um, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, nú sigur, at øll øki skulu vera kannað, og tað merkir, at Skorðhæddin, sum varskotin út í rúmdina, nú aftur er komin inn í "luftrúmið" hjá landsstýrismanninum, men eg sakni viðgerðin av at útbyggja Vága floghavn.

### Flogvøllurin í Vágum

Vit eru ikki í nakrari kreppustøðu hvat viðvíkur flogvølli, tí vit hava flogvøllin í Vágum í dag, sum við góðum vilja er nýtiligur til tey flogfør sum røkja flogrutuna til og úr Føroyum í dag, men tíðin og komandi flogfør krevja, at verandi flogvallarbreyt verður longd, eins og neyðugt verður at útbyggja og nútímansgera verandi terminal.

Tað var við hesum veruleika í huga, at vit settu í samgonguskjalið, at Vága Floghavn verður útbygd og nútímansgjørd.

Samgongan vil fremja útbyggingina, so flogfeløgini kunnu hava betri rammur at virka undir og harvið kunnu bjóða kundum sínum økta kapping, ið viðførir betri og bíligari tænastur.

### Bjarni Djurholm

Her farið eg at heita á landsstýrismannin, um at vinnumálaráðið nú gerð sítt arbeitt í samband við útbyggingina av flogvøllinum í Vágum liðugt, so løgmaður kann fáa avgreitt tey formligu tingini við donsku myndugleikarnar.

Tí tann økti aktiviteturin á flogvøllinum, bæði tá talan er um flogfør, ferðafólk, frakt og virksemi innan oljuvinnuna, krevja útbygging av floghavnini í Vágum, í dag heldur enn í morgin.

So Bjarni, brúka kreftirnar til at avgreiða spurningin um útbyggingina av floghavnini í Vágum, sjálvt um tað viðførir, at neyðugar kanningar av, hvar ein komandi flogvøllur skal byggjast, koma í aðra rekkju.

### Parkeringsviðurskiftini

Ein onnur neyðug útbygging, sum ikki beinleiðis er tengd at sjálvari floghavnini, eru parkeringsviðurskiftini við flogvøllin, men her stendur tað upp til landsstýrismannin í vinnumálum, at fáa hetta gjørt, og verandi støða krevur eina skjóta loysn.